Hoydal: Landsst‡ri› sveik

Landsst‡ri› hevur ikki kunna tingmenn og almenningin nóg væl í málinum um pensjónirnar. Ta› heldur Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur, sum kortini ikki fríkennir sínar egnu floksfelagar í løgtinginum.

Tjó›veldistingmenninir Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu áttu at tosa› vi› flokkin og samgonguna á›renn teir løgdu so har›liga út í málinum um pensjónirnar, sigur Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur

Dánjal Højgaard

Væntandi floksdisiplin og væntandi samskifti.

Solei›is hava umbo› fyri landsst‡risflokkarnar valt, at grei›a frá tí ru›uleika og politisku misnøgd, sum hevur valda› um pensjónina, sum gjørdist jólatrøll.

Løgma›ur hevur mestum havt hug, at taka landsst‡risumsitingina og landsst‡riskvinnuna í almanna- og heilsumálum í forsvar í hólmgonguni vi› tjó›veldistingmenninar Finn Helmsdal og Páll á Reynatúgvu.

Løgma›ur hevurført fram, at ásetingarlógin, sum sigur hvussu nógv pensjonistarnir skulu hava útgoldi›, var› send tingmonnum til ummælis í gó›ari tí› - longu 25. oktober í fjør. Men at eingin tingma›ur gjørdi vart vi› seg fyrr enn alt fór uppá kók í desember.

Teknisk problem

Men varaløgma›ur, Høgni Hoydal, heldur ikki, at landsst‡ri› kann turka ábyrgdina av uppá tingmenn.

Endaligu útrokningarnar av pensjónsupphæddini og skattabroytingin kom ov seint frá mi›fyrisitingini. Tískil høvdu tingmenn ikki fortreytir at gjøgnumsko›a avlei›ingarnar av pensjónmálinum fyrr, sigur hann.

-Tá máli› kom fyri tingi› mangla›u konsekvensútrokningarnar og broytingin í skattalóggávuni. Ta› var trupult hjá tingmonnum at meta um avlei›ingarnar, tá ongar konsekvensútrokningar vóru.

-Ta› er øgiliga óheppi, at mann hevur kunna› bæ›i almenningin og triva›arnevndina (í løgtinginum, blm.) so illa um máli›. Ta› má landsst‡ri› taka sær ábyrgdina av, sigur landsst‡risma›urin.

Eingin oyrafika

Hinvegin fríkennir landsst‡risma›urin ikki heilt sínar egnu floksfelagar, tingmenninar Finn Helmsdal og Páll á Reynatúgvu.

-Tingmenn hava sjálvandi loyvi at vera kritiskir, men ta› er ikki gott at mann leggur so har›liga út, sum mann ger í hesum føri.

-Teir áttu heldur at tiki› máli› upp innanh‡sis vi› flokkin og samgonguna, sigur landsst‡risma›urin, sum kortini er ósamdur vi› løgmann um, at ta› bilar vi› disiplinini í Tjó›veldisflokkinum.

-Tjó›veldisflokkurin hevur neyvan størri trupulleikan enn a›rir flokkar. Men greitt er - og ta› er naka› sum tosa› ver›ur um í ø›rum flokkur eisini - at arbei›i kann skipast betri.

Ver›a Páll á Reynatúgvu og Finnur Helmsdal banka›ir uppá pláss?

-Nei, nei. Tjó›veldisflokkurin fer at taka máli› upp um hvussu farast skal fram í slíkum málum, har ósemjan ikki er politisk men teknisk, sigur hann, sigur landsst‡risma›urin.

Máli› kom ov seint í tingi›

Fastir floksskrivarar og -talsfólk er eitt stig á lei›ini, at for›a fyri trupulleikum millum tingmenn og landsst‡ri, heldur Høgni Hoydal landsst‡risma›ur. Løgtingsforma›urin heldur, at pensjónmáli› er dømi um umsitingarligt seinføri.

Dánjal Højgaard

Løgtingi› átti at fingi› nógv betri tí› at vi›ger›a kompleks mál sum ta› um pensjónirnar, sigur Finnbogi Ísakson, løgtingsforma›ur

Strí›i› í pensjónsmálinum er ein lærupengi.

Ta› vísir, at ney›ugt er at gera mannagongdir, sum for›a fyri at umsitingarlig mál, sum fer›ast millum landsst‡ri og løgting, enda sum ein fjølmi›laódn.

Betri kunning frá mi›fyrisitingini er ein bót. Fastir floksskrivarar og -talsfólk, eru ein onnur, sum kunnu bøta um samskifti› millum tingfólk og landsumsitingina, heldur Høgni Hoydal, landsst‡risma›ur.

Gó›ur bæti

Løgtingi› hevur júst játta› 1,4 milliónir krónur til politisku flokkarnar, og ætlanin er, at hesin peningur skal n‡tast til, at seta floksskrivarar í fast starv.

-Ta› hev›i bøtt munandi um stø›una. Eisini hev›i ta› veri› ein bæti um flokkarnir høvdu sínar framsøgumenn, so at samskifti› var meira fyriskipa›, sigur landsst‡risma›urin.

Tingforma›urin ivast

Finnbogi Íslaksson, løgtingsforma›ur tykist kortini at ivast í um strí›i› um pensjónina hevur naka› sum helst samband vi› fastir floksskrivarar og framsøgufólk í løgtinginum.

-So vítt eg veit hava flokkarnir rættiliga fastar framsøgumenn. So á hasum øki eru skipanirnar hjá flokkurin nokkso fastar, sigur tingforma›urin.

-Ver›a dugnalig fólk sett í starv sum tingskrivarar so er greitt, at tey vera gó› hjálp hjá tingmonnum í øllum tingarbei›inum, sigur Finnbogi Ísakson, sum kortini hevur lítlan hug, at seta fakligu rá›gevingina hjá tingmonnum saman vi› júst pensjónsmáli›.

-Hóast tingarbei›i er og ver›ur styrkt, so slept ikki undan misskiljingum ella feilum. Og vandin er serliga stórur tá málini skulu skundast ígjøgnum, sigur Ísakson.

Skunda› ígjøgnum

Løgtingsma›urin heldur tó pensjonsmáli› vera eitt talandi dømi um hvussu illa ta› kann spæla av, tá løgtingi› ikki fær stundir, at vi›gera fløkt mál sum pensjónslógina og skattabroyting-arnar, sum fylgdu vi›.

-Øll mál, i› ver›a løgd fyri tingi› eiga at fáa ta› tí›i› krevst. Og tá talan er um kompleks mál sum hetta eigur tí›in at vera uppaftur longri, sigur tingforma›urin.

Eiler avsannar sølusleyg

Reiðarin á Krúnborg Eiler Jacobsen avsannar leysasøgutíðindi um, at dýrasta skipið í føroyska fiskiflotanum er á veg til Klaksvíkar

Einki er um tosið, at Krúnborg er á veg til Klaksvíkar, sigur Eiler Jacobsen

Niclas Johannesen

Meðan Krúnborg loksins fór á sín fyrsta túr mánakvøldið skúmaðu leysasøgur kring Havnina um, at nýggja skipið hjá Eiler Jacobsen var á veg til Klaksvíkar.

Gomlu makkararnir Jóhan Páll Joensen og Frank Uhrenholt skuldu havt bjóðað.

Men nix.

Roykur og ongin grind, sigur Eiler Jacobsen.

– Ja, eg havi hoyrt nógvar søgur av hasum slag. Eg veit ikki, hvat tær koma frá. Kanska er tað onkur, sum spælir hund, finnur upp á og gerst dagsins maður við dagsins søgu. Men hetta hevur absolutt onki upp á seg.

Krúnborg roynir eftir makreli vestan fyri Shetland. Reiðarin sigur, at teir royndu at kasta og alt sær út til at rigga væl. Haraftrat hevur Krúnborg hoyrt frá skotskum bátum, ið hava borið við makrel.

– So nú verður spennandi, leggur Eiler Jacobsen aftrat.

Tekur fulla ábyrgd

Helena Dam á Neystabø sigur seg taka fulla ábyrgd av óskilinum av nýggju pensjónslógini

John Johannessen

– Eg taki á meg alla ábyrgd fyri, at tingini ikki eru gingin sum ætlað viðvíkjandi nýggju pensjónslógini, men eg haldi, at vit nú eiga at leggja allar kreftir í at betra um viðurskiftini í staðin fyri at leggja eftir hvørjum øðrum.

Helena Dam á Neystabø heldur ikki, at tingfólk hava ábyrgdina av, at skilið er vorðið, sum tað er. Men hon er ikki samd, tá tingfólk siga, at hvørki høvd ella hali var á uppskoti hennara. Var hetta veruleiki, kundu tingfólk bara sagt frá beinan vegin, heldur hon.

– Tað er rætt, at tað ikki er tikin hædd fyri ávísum skattaviðurskiftum í uppskotinum, men eg má ásanna, at eg ikki havi mett hetta sum eina uppgávu hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum, men heldur eina uppgávu hjá Fíggjarmálastýrinum.

Helena Dam á Neystabø fer nú at leggja allar kreftir í at fáa pensjónsviðurskiftini upp á pláss, og hon vónar, at tingfólk fara at stuðla henni í staðin fyri at leggja

eftir henni.

Orsøkina til, at ásetingarlógin kom so seint fyri tingið, sigur landsstýriskvinnan vera, at fíggjarkarmarnir ikki vóru í lagi, so málið kundi komið fyrr fyri.

Helena Dam á Neystabø vónar ikki, at stíðið í seinastuni hevur sett samgongustevið í vanda. Hon hevur ikki mist mótið, sigur hon og vísir á, at hon aldri hevði væntað, at hennara sessur fór at vera léttur at sita í.

Sjálvsstýrsflokkurin viðgjørdi á fundi týskvøldi ábreiðslurnar frá samgongutingmonnum, og var niðurstøðan eftir røður løgmans og varaløgmans á tíðindafundinum týsdagin, at flokkurin framhaldandi veitir samgonguni fullan stuðul.

Deildarleiðari til ALS

Starvið sum deildarleiðari á Tryggingar- & ávísingardeildini er leyst at søkja

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er í góðum samskifti við starvsfólkið at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini.

Tryggingar- & ávísingardeildin, sum í løtuni hevur 11 starvsfólk, umsitur:

- Vanligan arbeiðsloysisstuðul,
- fiskavirkisskipanina,
- arbeiðsávísing,
- førleikagevandi tiltøk,
- farloyvisstuðul,
- flyting millum A-kassar og
- arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi.

Starvið er avbjóðandi og krevjandi. Deildarleiðarin skal tí hava hóskandi útbúgving og góðar starvsroyndir, umframt hava gott innlit og áhuga í føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Viðkomandi skal vera førur fyri og hava hug til framhaldandi at menna tænastustøðið hjá deildini.

Arbeiðsloysisskipanin stendur støðugt fyri broyttum arbeiðsfortreytum, og skal deildarleiðarin hava evnir at tillaga seg broytingum í arbeiðsumstøðunum.

Deildarleiðarin myndar, saman við deildarleiðaranum fyri Fíggjar- & fyrisitingardeildina og stjóranum, dagligu leiðsluna á Arbeiðsloysisskipanini.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. januar 2000. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Allan Skaalum ella Elisabeth O. Gaardbo á tel. 318396, lokal 137.

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

ALS

Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo